# Fjølmiðlarnir hava verið tað truplasta




*Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen tekur minst eina ferð um árið mannin við til Føroya*

**Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen trívist væl í leiklutinum sum fyrstafrúa Danmarks. Hon viðgongur tó, at fjølmiðlarnir hava verið tað truplasta við nýggju rolluni**

HVONN LIVE
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*myndir: Álvur Haraldsen*

Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen, kona forsætisráðharran Lars Løkke Rasmussen, segði í samrøðu við Rás 2 leygarkvøldið, at hon trívist væl í rolluni sum forsætisráðharrafrúa.

Tað eru níggju mánaðir síðani at Lars Løkke Rasmussen tók við sum forsætisráðharri eftir Anders Fogh Rasmussen. Síðani tá hevur nógv fokus verið á familjuni Rasmussen, fyri bæði gott og ringt.

Sólrun viðgongur, at fjølmiðlarnir hava verið tað truplasta við hesum leiklutinum.

- Eg eru upprunaliga ein nokkso privatur persónur, so tað hevur kravt nakað av tilvenjing, ásannar fyrstafrúan.

Men síðani Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen gjørdist fyrstafrúa Danmarks hevur gerandisdagurin ikki broytt seg so øgiligt.

- Nei, tað er komið so líðandi. Eg fari til arbeiðis, eg koyri børnini í song og so framvegis, so nei, tað er ikki blivið nógv øðrvísi, sigur hon.

## Vil ikki verða ministari

Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen er sjálv politiskt aktiv, og hevur leingi verið kommunalpolitikari. Men hon hevur ongar ambitiónir um at taka næsta stigið og gerast landspolitikari.

- Ja, altso eg intresseri meg nógv fyri skúlanum. Mínar politisku ambitiónir eru at fáa heimsins besta skúla í Danmark. Men ikki at gerast ministari. Eg havi tað fínt við at halda meg til kommunalpolitikk. Men eg havi ikki ambitiónir um at koma í landspolitikk.

*Men hevur tú ongantíð sagt við mann tín, at hann skal seta teg sum ministara?*

- Nei, tað havi eg ikki. Tað krevur eitt heilt annað sinnalag enn tað, sum eg havi.

*Hvat meinar tú tá við?*

- Ja, tá skal mann hava heilt spískar albogar.

*Og tað hevur maður tín?*

- Ja, maður mín hevur góðar albogar, segði Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen í sendingini Hvonn Live á Rás 2.

## Vitja hvørt ár í Føroyum

Forsætisráðharrin og frúan eru ikki ókend í Føroyum. Sólrun greiddi leygarkvøldið frá, at tey hava verið her hvørt einasta summar, síðan tey komu saman.

- Onkuntíð hava vit ikki verið, men so er tað tí vit hava valgt at koma um veturin ístaðin. Men okkum dáma øgiliga væl at koma her, sigur Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen.

---

# Hevði Hjalgrím bara skorað

**Seinastu nógvu árini hevur Tórður Mikkelsen fingist við ítrótt í sjónvarpinum. Nú fer hann at gevast við ítróttinum, men millum hendingarnar, hann minnist best, var tá Hjalgrím Elttør skeyt á stongina ímóti Týsklandi í 2002**

HVONN LIVE
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Tórður Mikkelsen hevur verið sera fegin um tíðina, hann hevur arbeitt við ítrótti. Hann tímur næstan allan ítrótt, og ivast, um hann fer at megna at halda seg burtur*

Tórður Mikkelsen var í kvøld gestur í sendingini Hvonn Live hjá Rás2 og har avdúkaði hann millum annað, at millum hendingarnar, hann minnist best frá tíðini í 3-2 hjá sjónvarpinum var tá Hjalgrím Elttør skeyt á stongina og út, heldur enn stongina og inn, tá hann í yvirtíðini gjørdist púra leysur við Oliver Kahn og støðan var 2-1 til Týskland, sum stutt frammanundan høvdu verið í HM-finaluni.

Av øðrum hendingum minnist Tórður Mikkelsen serliga, tá Føroyar vunnu á Litava fyri kortum, og tá báturin hjá Katrini Olsen var til HM í rógving í Týsklandi, har tær við seinastu tøkunum megnaðu at koma upp á triðja pláss.

## Tímur ikki motorar

Hóast sjónvarpsmanninum dámar so gott sum alla ítrótt, so tímir hann ikki Cricket, Golf, Rugby og Motorsport.

– Men tað hevði eg kanska, um eg setti meg ordiliga inn í reglarnar, segði hann.

Hann segði somuleiðis, at hann sjálvur ikki hevur fingist so øgiliga nógv við at íðka ítrótt, tí hann gekk meira í haganum og fekst við seyð á sínum yngri døgum.

## Angrar onki

Tórður Mikkelsen hevur arbeitt nógv og gjørt nógv. Millum tað hevur hann eisini gjørt nøkur ting, sum kunnu verða nevnd mistøk, men Tórður Mikkelsen angrar onki av hesum.

– Tað er í lagið at lata set ríva við. Ítróttarfólkini ganga við lív og sál upp í hetta, so er tað púra natúrligt, at mann gongur upp í tað, segði Tórður Mikkelsen, og viðgekk, at onkuntíð eru nøkur mistøk hend, men at tað má mann bara taka við.

Hóast Tórður Mikkelsen nú er givin við ítrótti, tí hann fer at gera sendingar av bygd í sjónvarpinum, so letur hann framvegis hurðina standa opna til ítróttina.

– Tað er spurningurin, um mann klárar at halda seg vekk. Tað var onki vikuskifti, at eg ikki hevði hug at fara til arbeiðis, staðfesti Tórður Mikkelsen á Hvonn Live leygarkvøldið.